**Føðingar**
6. november fingu Irena og André Matras, Norðoyri, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4040 gr.

11. november fingu Maiken Jacobsen og Brian Joensen, Norðragøta, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 5200 gr.

17. november fingu Guðrun og Torkil Steinberg, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3950 gr.

18. november fingu Laufey B. Oskarsdóttir og Pauli Hansen, Argir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.



**Brúdleyp**
Vit skulu giftast leygardagin 22. november kl. 14.00 í Kunoyar Kirkju, Joan Heinesen, Norðoyri og Sonni Jacobsen, Vestmanna. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Kunoy kl. 19.00.

Leygardagin 22. november giftast Katrin Olsen og Jógvan Thomsen, bæði búsitandi í Hoyvík. Vígslan verður í Hoyvíkar kirkju kl. 13.00. Tey, ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið eru hjartaliga vælkomin í húsið hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9, frá kl. 19.00.

frá 17.-21. nov.
**85 ár.**
Mánadagin fylti Mortan Vang 85 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum í Hvalba leygardagin 22. novembur frá kl. 11 - 16. Øll eru Hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
22. november eru 50 ár liðin, síðani vit blivu gift. Dagurin verður hildin í miðhøllini í Vestmanna skúla millum kl. 13 og 18. Vælkomin.

*Finngerð og Heini*



Leygardagin 22.11.2008 kl 13 giftast í Skála kirkju, Poula Dulavík Olsen og Arnhold Berg, Skála. Døgurði verður í bygdarsalinum í høllini á Skála fyri innbodnum kl. 17. Vælkomst verður eftir kl 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# Mortan Vang í Hvalba 85 ár



24. novembur 1923 sá okkara kæri abbi dagsins ljós í Geilini í Hvalba. Hann er elstur av 7 syskjum. Pápan misti hann, sum smádrongur, eftir hetta noyddist hann at hjálpa mammu síni við yngru syskinum.Hann giftist við okkara kæru ommu, Marin Kristinu úr Sandvík, sum ikki er okkara millum longur. Tey fingu tvær døtur, trý abbabørn og trý langommubørn.

Abbi hevur arbeitt alt sítt langa lív bæði á sjógvi og landi. Hann hevur verið óførur, altíð til dystin fúsur, hansara partur hevur ikki verið eftir. Heilsuna hevur hann havt góða.

Bjørgini hevur hann einisøkt, har var hann óræddur og klófastur, mangan bitan hevur hann drigið til hús úr bjørgunum.

Barnvinur er hann sum fáur, børn halda nógv av honum, tokka til hansara fáa tey beinanvegin. Hann eigur altíð okkurt gott, bæði orð og søtmeti.

At koma í heim hansara hevur okkum altíð verið ein stuttleiki. Har hava altíð verið stundir til okkum, bæði til álvara og gaman. Umsorgan um okkum hevur hann altíð havt.

Nú árini eru vorðin 85, hevur hann samband við okkum, og vit við hann. Vit høvdu ynskt, at tú búði okkum nærri, so vit kundi vitja teg oftari. Okkara tankar eru um teg hvønn dag, í okkara heimi verður eisini snakkað nógv um teg.

Vit vilja ynkja tær hjartaliga tilukku á 85 ára degnum. Má Harrin signa framtíð tína, og verða hjá tær. Vit elska teg.

Hetta er ein heilsan av Viðareiði.

**Abbadótturin**

# Listaframsýning í Smiðjuni





Hósdagin byrjaði listaframsýningin "Mínar søgur" hjá Edith Mørkøre í Smiðjuni í Lítluvík í Havn. Á framsýningini eru akrymálningar í øllum støddum.

Í teimum abstraktu málningunum fortelur Edith frá ymiskum hugsjónum og søgum, Íblásturin eru evnir sum rørast í tí dagliga lívinum og hendingum sum hon, ella onnur rundan um hana koma út fyri.

Framsýningin í Smiðjuni heldur áfram í vikuskiftinum og til og við týsdagin 25. nov. Fríggjakvøldið er opið til kl 20, leygardag frá 12 – 20, sunnudag frá 14 – 20, og mánagin og týsdagin frá 12 - 18. www.edithart.com.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

# Bilasølur bjóða bilfígging

Nú fíggjarstovnar og onnur sum bjóða fram bilfígging tátta í ella gevast við at fíggja bilar, bjóða Auto Service og Reyni Service lagaliga fígging av nýggjum og brúktum bilum við 25 prosentum í útgjaldi til eina lagaliga rentu, sigur Árni Rasmussen, stjóri hjá Auto Service.




Lesið Sosialin so eru tit við